Álit II

í

løgtingsmáli nr. 96/2025: Uppskot til løgtingslóg um at útvega nýggjan bygning til Sjúklingahotellið í Keypmannahavn

Landsstýriskvinnan í heilsu- og orkumálum, Eyðdis Hartmann Niclasen, hevur lagt málið fram 24. apríl 2026, og eftir 1. viðgerð 28. apríl 2026 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin viðgjørdi málið á fundi 4. og 8. mai 2026.

Undir viðgerðini hevði nevndin fund við landsstýriskvinnuna í heilsu- og orkumálum, Eyðdis Hartmann Niclasen, saman við Sjúkrahúsverkinum.

Nevndin legði fram álit 12. mai 2026

Við 2. viðgerð 15. mai 2026 varð málið beint aftur í nevnd.

Nevndin hevur síðani viðgjørt málið á fundi 19. og 21. mai 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Ráðgevarafelagið og landsstýriskvinnuna í heilsu- og orkumálum, Eyðdis Hartmann Niclasen, saman við Sjúkrahúsverkinum.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Í fyrra álitinum varð møguleikin umrøddur at lata føroyska byggivinnu sleppa við í verkætlanina, men niðurstøðan var, at áhugin fyri hesum tyktist ikki at vera stórur. Hesum var Ráðgevarafelagið tó ikki samt í, og vísti sína misnøgd við orðingina í álitinum. Fyri at fáa greiðu á hesum, varð málið beint aftur í nevnd.

Fíggjarnevndin hevur síðani havt fund við Ráðgevarafelagið og Eyðdis Hartmann Niclasen, landsstýriskvinnu.

Undir viðgerðini er komið fram, at føroyskar fyritøkur eru, ið hava áhuga í slíkari verkætlan.

Landsstýriskvinnan hevur upplýst fyri nevndini, at avgerðin um at leiga ein bygning, heldur enn at byggja og eiga ein sjálvi, er tikin fyri langari tíð síðani. Tí er tað Bygningsstyrelsen í Keypmannahavn, ið nú stendur fyri verkætlanini. Kortini er tað møguligt hjá føroyskum fyritøkum at bjóða seg fram at gera ymisk arbeiði í sambandi við verkætlanina. Landsstýriskvinnan hevur

eisini sagt seg vera sinnaða at boða Bygningsstyrelsen frá, at føroyskar fyritøkur hava áhuga í at gerast partur av verkætlanini. Tó heldur hon ikki, at landsstýrið kann krevja, at føroyskar fyritøkur sleppa upp í part.

Víst verður annars til viðmerkingarnar í fyrra álitinum.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 21. mai 2026

Helgi Abrahamsen formaður	Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur næstforkvinna	Bill Justinussen
Bjarni Hammer	Eyðgunn Samuelsen	Sirið Stenberg
	Ruth Vang	